Ein saklig viðgerð:

Tað fría orðið

Aftursvar frá Høgna av Heiði til greinarøðina »Tann totaliteri staturin« hjá Jens Paula Heinesen

Tað hann, Jens Pauli, sigur, hevur hann havt nærum **eitt heilt ár** um at bøla hesum eggjunum, sum nú bert maðkur kom úr. Vit frætta, at tað var gitið í vár, tá ið — vit minnast — gomlu partamenn hansara, fólkaflokksmenn, hevdu úr at gera at loypa á Fólk fyri Friði, William Heinesen og onnur. Líkt er til, at hesin ágangur var ikki nóg mikið, men tvørturímóti tekur íblástur til hetta hatursálopið á vinstrafólkið beint upp undir jólini.

Tað skilst, at maðurin leggur upp til orðaskifti, emn eftir ynski helst ikki viðnakað viðhaldsfólk Sovjets ella ideologiskt »trúgvandi og frelstum« - Tað sigur hann bart út —, tá tá verður »veruleikin… til falsan, til pynt upp á mytuna«. Nei einans tey ið frammanundan bera agg og hatur til kommunismuna og tann sokallaða «totalitera statin Sovjet», og helst tey, sum ongantíð hava vitjað Sovjet, skulu sleppa at kjakast við J.P.H. Havi eg hoyrt so skapt!

Tvørturímóti meta skilafólk, ið stuðla tí fría orðaskiftinum, at eitt viðhaldsfólk kann koma við nøgvum góðum sjónarmiðum, og at eitt reiðiligt orðaskifti **krevur** at **báðir partar** eru umboðaðiir. Eisini meta vit, at fólk ið hava kannað og kent evni at sínum egna kroppi — búð í landinum — hava bestu fyritreyt fyri at tosa um tað. Og hesa fyritreyt eigur JPH ikki, men dittar sær tó at skriva heilar 12 blaðsíður um evnið! Hetta kalli eg fantastiskt! Og góðskan varð jú eisini hareftir.

Er frustration orsøkin?

Hvør orsøkin kann hugsast at hava elvt tú eina slíka greinarøð av tí breckmanska slagnum? Sum flestum kunnugt, gongur rithøvundurin — ella **skaldið**, sum hann yndar at kalla seg — JPH og veður í einari langsamiligari endurminningarskaldsøgurøð, sum í grundini bert eru endurtøkur av gomlum søgum hansara. Sum ein ummælari, Árni Dahl, so beinrakið tekur til:«AT halda fram í sama stíli tykist bókmentaligt sjálvdráp...». Tí fólk eru leidd av hesum endurtøkunum og tí eginkæra gabbinum. Tann lítla og onga undirtøkan og eftirgáanin, sum fólkið hevur sýnt hesum dygdarleysa skaldskapinum, hevur eyðsæð elvt til mikla frustratión og vónloysisøði hjá manninum, og tá er tað, hann sum vant setur seg í díkið.

Tann jenspaulska totalitera hugsanin

JPH kallar greinarøðina»Tann totaliteri staturin» og sigur, at hann fer bara at viðgera Sovjet. Orðið «totaliterur» kenna fólk frá tí kalda krígnum, tá serliga USA var so íðið at grýta eystanlond undir í líkum og ólíkum, men nýtta tað ongantíð um síni vinalond í Suðurameriku og aðrastaðni. Eins og USA tá royndi at tengja almenna ansin at tí «gudleysa, ræðuliga» Sovjetstatinum, fyri at fólkið ikki skuldi hugsa um óskilið í teirra egna bandaríki, ger JPH nú tað sama, tí gudarnir vita, at mangt er at átala og rætta á hesum klettum eisini. «—Hygg um teg sjálvan...», eiga vit at hugsa og taka upp til viðgerðar tær sokallaðu «totalitera» leivdrinar (—mær dámar einki hatta ófullfíggjaða fremmanda eiti,) hjá okkum sjálvum. Hetta hevði verið rættvís og saklig viðgerð. í staðin leggur JPH fyri við hesum:«Aðalreglan um tann totalitera statin er henda: Hann er altíð verri enn tú grunar». (!) Valla havi eg hoyrt gretta betri aðalreglu fyri grundarleysan **illgruna**, og havi eg hug at kalla hetta fyri »ta jenspaulsku totalitera hugsanina«. Henda aðalregla var støðið undir greinarøðini sum gjørdist hareftir.

Mín hugsan

Samstundis sum eg beinanvegin má ásanna, at nøgv verður dult fyri teimum sovjetsku borgarunum av systeminum, má eg eisini ásanna, at **nøgv** verður dult fyri okkum av okkara systemi. Her hugsi eg um ta tænastu, tíðindastovnar, bókasøvn og útbúgvingarverk bjóða fólkinum. Hetta eru mínar royndir av at búgva í báðum systemunum, og eg eri til reiðar at avdúka tær, so við og við. Hesar royndir eigur JPH tíverri ikki. Men kanska er tað júst tí, hann «veit betri»?!

Ymiskar upplýsingar

Tí hann «veit», at Sovjet «hevur ongan almenning og onga frælsa pressu… upplýsingarnar eru avskeplaðar, litaðar heilar og hálvar lygnir ... at sovjetbúgvin av hesum sama hevur eina púra avskeplaða mynd ikki bara av umheiminum, men eisini av sínum egna. Tí gongur hann sum eitt villlfarandi fár uttan samband við veruleikan». Og so hevur hann hoyrt sitt dømi um eini foreldur í Sovjet, sum «vistu ikki um nakað kríggj har» — í Afganistan. Jú so? Er hatta satt, so hava hasi neyðar foreldur hvørki lurtað eftir útvarpi ella hugt í sjónvarp ella tosa við fólk í fýra ár, tí t.d. sjónvarpið hevur hvørja viku sending (líkist TV-aktuelt) frá skilinum í Afganistan, sum eg var so heppin at síggja. Sjálvandi vóru tær í parti við Sovjet, eins og allar tær donsku sendingarnar, eg havi sæð, havi verið ímóti Sovjet í Afganistan, og sum vinur mín í USA nú skrivar mær, er tað ikki smettin mætari í USA (—«eitt opið samfelag, tað hevur eina frælsa pressu», «veit» JPH,) nú teir tóku Grenada:Sensurin sensurin forðaði øllum óynsktum — hervaldið loyvdi bert «góðtiknum» tíðindafólki upp á land í Grenada — og amerikanska fólkið fagnar innrásina, siga kanningar!

Annars varð eg ovfarin av tí sovjetiska sjónvarpinum, sum eg fyrr illgrunaði fyri at bert visa ta ljótu ranguna á teimum kapitalistisku londunum — sum J.P. sigur —, áðrenn eg sá, at teir gud hjálpi mær ikki aftra seg fyri at sýna øllum teimum 270 miljónum «kúgaðu» sovjetbúgvunum hesi veldugu, stásiligu amerikansku akførini, ið aka oman eftir teimum stóru motorvegunum undir skriggjandi høgum skýskravarum og glæstriborgum miljóningana. Men teir gloyma heldur ikki at visa fátækrabýlingarnar og ríðilin av arbeiðsleysum í kø uttan fyri stuðulstovnarnar og suppukøkarnar. Sovjetska sjónvarpið aftrast heldur ikki at visa sínum fólki teir fantastisku robottarnar í japonsku verks.miðjunum ella hvussu eitt miðalhúski í Japan húsast, og kann eisini finna upp á at snodda seg fram á gamlar órevsaðar nazibøðlar í teirra uppskrýddu húsum í Vesturtýskalandi og USA har hesir hugna sær undir veingjabreiði stýrisins. Tó er lýti, sum ikki áttu at verið, eitt nú tann varisliga, lítið atfinningarsama viðferðin av landsins ovasta Andropoff, hóast hann er væl dámdur í Sovjet. Men á tann hátt Reagan sleppur at týggja sær í amerikanska sjónvarpinum, og ta totala vald tey kristnu hava á Føroya útvarpi og sjónvarpi, er ikki smittin mætari. Ella tak nú hasa donsku TV-aktueltsendingina fyri stuttum um Grenada og støðuna í Miðamerikku sum heild: 99% av senditíðini sluppu amerikanskar stjórnarkeldur at hava orðið! JPH hevur ikki havt tey vesturlendsku tíðindamonopolini í huga, og tað spilti greinarøð hansara.

Í nøgv ár havi eg lurtað eftir Útvarpi Føroya og hugt í danska sjónvarpið, og í eitt ár hugdi eg í tað sovjetiska. Mín **niðurstøða er, at sovjetbúgvin fær eina meira sakliga heildarmynd av heiminum enn føroyingurin.** So kunnu summi, ið ongantíð hava skeitt í tað sovjetiska sjónvarpið, kalla sovjetbúgvan « eitt villlfarandi fár uttan samband við veruleikan». men eru tað sjálvi.

Eg havi ikki sagt seinasta orðið í hesum máli.

Høgni av Heiði

FF: roknast kann við skrædli í avreiðingarprísi

Mælir landsstýrinum til at hækka játtanina til ráfiskagrunnin:

Føroya Fiskimannafelag hevur sent landsstýrinum eitt skriv í sambandi við tað, at landsstýrið hevur fingið eina umsókn frá ráfiskagrunninum um at lækka prísirnar í úrtíð, afturat teimum lækkingum, ið eru farnar fram fyrr í ár.

Orsøkin til umsóknina frá ráfiskagrunninum er hon, at avrokningarprísirnir eru falnir so mikið, at játtanin til ráfiskagrunnin orkar ikki at bera teir galdandi prísmuninar.

— Støðan er enntá so hættisilig, at tá hetta árið er farið, verður lítið og eini eftir av tiltaksgrunninum. Hetta vil siga, at alt annað óbroytt, standa vit yvir fyri einum rættuligum skrædli í avreiðingarprísunum, og tað ikki seinri enn fyrst í komandi ári, sigur fiskimannafelagið í brævinum til landsstýrið. Framhaldandi verður í brævinum sagt:

Ringast hjá línuskipunum

— Vit vita, hvørjar avleiðingar hetta kann koma at føra við sær. Ringast verður tað tá hjá línuskipunum. Ymisk tiltøk hava verið gjørd fyri at bøta um teirra møguleikar, sum t.d. at veittur verður hægri prísur fyri húkveiddan fisk, men um einki verður gjørt kemur eitt generelt fall í avreiðingarprísunum eisini at raka línuna, og tað ásanna allir partar, at tað tolir hon als ikki.

— Hjá trolarunum er støðan tann, at teir hava gjørt eitt gott ár í ár serstakliga takkað verið tí hoyrt góða fiskiskapi, sum ehvur verið í ár. Um fiskiskapurin í ár kundi roknast fyri at vera »normalur« kundi roknast við, at trolarrnir toldu um prísirnir lækkaðu nakað.

Roknast kann við minni veiðu og prísi

— Men hesum hava vit onga trygd fyri. Tað er heldur tvørtur ímóti. Tað kann væl roknast við, at komandi ár verður fiskiskapurin aftur, sum hann hevur verið árini frammanundan, og tá koma vit at síggja eitt stórt skrædl í inntøkuni hjá hesum fiskimonnum. Ikki bert kann roknast við minni veiðu enn í ár, men tá verður eisini ein munandi lægri prísur enn tan sum hevur verið bæði í ár og í fjør. Og hetta hendir samstundis sum lønarlagið annars sjálvsagt fer hinvegin.

Vit halda, at landsstýrið hevur ávísar skyldur her. Og tær eru í fyrsta umfari at geva ráfiskagrunninum so mikið av játtan í hesum fíggjarárinum, at prísirnir kunnu haldast á núverandi støðinum. Tað kann ikki vera rímiligt, at fiskimenn eru tann einasti partur av samfelagnum, sum skal merkja at vit hava marknaðarkreppu. Hetta merkir jú ein minkandi inntjening til samfelagið sum slíkt, og byrðarnar av hesum má eisini alt samfelagið vera við til at bera.

Dýr tons fyri grunnin

Í sambandi við at fíggjarlógin fyri komandi ár er við at verða fyrireikað nú, eigur spurningurin um játtan til ráfiskagrunnin eisini at verða tikin upp. Her kunnu somu sjónarmið sum nevnt frammanundan takast fram, men vit vilja eisini minna landsstýrið um, at landsstýrið hevur beinleiðis stuðlað eisini prísásetan, sum elvir til at veiða bilig fiskaslag, sum t.d. upsa, fyri at serliga toskastovnurin kann verða spardur. Men ein slík prísáseting kostar pening. Nevnast kann, at fram til 1. november eru undir Føroyum veidd umleið 7.000 t. meira av upsa enn í fjør, av kongafiski 600 t. meira og av bláløngu 1.500 t. meira. Hetta eru

Framhald á síðu 13